## Hundaframsýning á Nabb

Nógv umrødda framsýningin av rasuhundum verður leygardagin 14. juli í høllini á Nabb. Áhugin er stórur, og yvir 60 hundar eru tilmeldaðir. Dagurin byrjar kl. 10.00 við sýning av hvølpum og rasuhundum. Kl. 13.00 verður framsýningin sett. Síðani byrjar framsýningin við tónleiki, og eftir tað verður mótasýning. Jens Marni Hansen spælir lættir tónar og Beinta Vilhelmsen vísir creatiónir til hund og eigara. So byrjar framsýningin av rasuhundum við Dansk Kennel Klub ættartalvu. Fleiri hundar, sum eru sýndir fyrrapartin, hava fingið ættartalvu og verða eisini við á framsýningini seinnapartin. Serkønir hundaserfrøðingar og dómarar úr Danmark og Svøríki eru við á framsýningini.



## Vorðið sum fongur

Ein íslendskur útróðrarmaður fekk í gjár ein kalva, sum vigaði 400 pund. Bragi Steingrímsson, sum er útróðrarmaður í Vestmannaoyggjunum, mátti fáa hjálp til at fáa kalvan inn í bátin, skrivar Morgunblaðið. Kalvin var um hálvan triðja metur til longdar, og hann vigaði 396 pund. Sambært Morgunblaðnum er hetta ikki fyrstu ferð, at Bragi Steingrímsson hevur fingið stóran kalva, men hesin er tó tann størsti.

# Ókeypis at lesa í Skotlandi

**Frá komandi skúlaári, 2007/08, verður tað ókeypis hjá føroyingum at lesa í Skotlandi. Tað váttar mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni**

ÚTBÚGVING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jógvan á Lakjuni metir, at lækkaði lestrarkostnaðurin í Onglandi og avtikna gjaldið í Skotlandi merkja eina sparing hjá landinum upp á um seks til sjey milliónir krónur um árið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var ein stórur lætti hjá teimum føroyingum, sum lesa í Onglandi, tá tað herfyri bleiv gjørt av, at føroyingar hereftir skulu roknast javnbjóðis borgarum í EU-londunum.

Heilt nágrgeiniligt merkir hetta, at kostnaðurin fyri at lesa á hægru skúlum í Onglandi fer úr áleið 80.000 krónum niður í áleið 30.000 krónur um árið. Hetta er júst tað sama, sum onglendingar sjálvir og aðrir EU-borgarar gjalda fyri sín lesnað.

Nú frættast uppaftur betri tíðindi úr Skotlandi. Av tí at Skotland og Ongland eru saman í sonevnda Commonwelth, varð roknað við, at lækkaða gjaldið eisini fór at verða galdandi fyri lesandi føroyingar í Skotlandi, men nú vísir tað seg, at tað fer at gerast púra ókeypis at lesa í norðurpartinum av Bretlandi.

Tað er Aberdeen University sum hevur boðað frá hesum, og Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, váttar, at so er.

- Ymsu sjálvstýrandi økini í Bretlandi gera sjálvi av, hvussu tey skipa sína útbúgving. Nýggja skotska stjórnin hevur so gjørt av, heilt at strika skúlagjaldið, tað hava vit fingið váttað. Hvussu verður í Wales og Norðurírlandi er ikki heilt greitt enn, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Landið sparir

Føroyar verða í hesum sambandi mettar sum »Overseas Territory«, tað vil siga sum eitt »hjáland« hjá í okkara føri Danmark. Danir eru limir í EU, og tí verða føroyingar eisini roknaðir sum slíkir.

Hetta merkir so aftur, at føroyingar verða mettir javnbjóðis EU-borgarum, og tá Skotland er í somu støðu sum Føroyar, tað vil siga EU-limir saman við Onglandi, so merkir tað, at tá tað gerst ókeypir at lesa í Skotlandi fyri skotar og EU-borgarar, gerst tað somuleiðis ókeypis hjá føroyingum.

- Hetta fer kortini ikki at merkjast hjá teimum lesandi, tí seinastu átta árini er tað landið, sum hevur goldið skúlagjaldið. So tá hetta gjaldið fellur burtur, so verður tað við øðrum orðum landið, sum fer at spara lutfalsliga nógvan pening, sigur Jógvan á Lakjuni.

Tað er sonevndi ÚSUN-játtanin (ÚtbúgvingarStuðul Uttanfyri Norðurlond), sum hevur rinda peningin, og saman við lækkaða gjaldinum fyri lesnað í Onglandi roknar Jógvan á Lakjuni við, at bara fyri lesandi í Bretlandi merkir hetta eina sparing fyri landskassan upp á seks til sjey milliónir.

- ÚSUN var játtað fyri at eggja ungum at søkja útbúgving aðrastaðni enn í Danmark, og Mentamálaráðnum er heimilað at gjalda upp til 120.000 krónur fyri hvønn næming um árið. Í meðal kostar hvør næmingur landinum einar 80.000 krónur árliga, metir landsstýrismaðurin í skúlamálum.

Endaligа próvtøkan hevur kostað tritúsund pund, og møguliga verður hetta gjaldið eisini avtikið. Tað er tó ikki heilt greitt enn.

## Fiskimenn skulu læra hvør av øðrum

**Norðurlond:** Í heyst verður ein nýggjur norðurlendskur felagsskapur fyri fiskimenn settur á stovn. Endamálið er at fiskimenn skulu arbeiða tættari saman.

Í farnu viku var fundur hildin millum fiskimálaráðharrarnar í Norðurlondum í finska býnum Pori, og her varð hetta evnið tikið fram.

Á fundinum vóru umboð fyri fiskivinnuna í Íslandi, Noregi og Føroyum, eins og úr Danmark sum luttók á fyrsta sinni. Einki umboð var úr Svøríki, men haðani eru vissa fingin fyri stuðli til ætlanina.

### Sama mál

Høvuðsmaður aftanfyri ætlanina er Petur Bjarnason frá Fiskifelag Íslands.

– Hesin nýggi felagsskapurin skal ikki koma ístaðin fyri nakran annan felagsskap, men skal vera ein pallur fyri einum tættari samstarvi innan fiskivinnuna í Norðurhøvum, sigur hann við blaðið Fiskaren.

Hann vísir haraftrat á, at tey seinnu árini hevur verið trupult at fáa eitt samskifti um fiskivinnuna í Norðurlondum. Nú verður hinvegin góður møguleiki fyri hesum.

Tað hevur verið gjørt alt ov lítið við at arbeiða tvørtur um mørkini innan norðurlendska fiskiveiði. Orsøkin til hetta er millum annað hon, at summi lond eru við í ES og onnur ikki, men fyri Petur Bjarnason er hetta ikki nøkur forðing sum so.

- Vit hava øll ymisk sjónarmið, og kunnu læra hvør av øðrum, slær hann fast.

**sb.**

# Klárt um fáar mánaðar

**Fyrstu grundstykkini í stóru útstykkingini í Nólsoy verða klár um nakrar fáar mánaðir, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri**

ÚTSTYKKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Stóra útstykkingin í Nólsoy verður framd í tveimum.

Fýra til seks grundstykkir verða klár um fáar mánaðir, hin parturin, sum umfatar randarhús, skal fyrst leggjast inn í eina broytta býarætlan, og slíkt tekur sum kunnugt tíð.

Men støðan við teimum fyrru grundstykkjunum er so, at vegurin til útstykkingina skal gerast liðugur, og síðani skal kloakk, vatnveiting og el leggjast til. Arbeiðið upp á vegin er boðið út, so Heðin Mortensen kann ikki ímynda sær, at tað fer at ganga long tíð, áðrenn tey fyrstu grundstykkini eru klár.

- Vit tosa um fáar mánaðir, sigur borgarstjórin í Tórshavnar Kmmunu.

Við restini av útstykkingini er støðan eitt sindur øðrvísi. Ein broytt býarætlan skal leggjast alment fram, og so hava fólk tríggjar mánaðir at gera sínar viðmerkingar. Eftir hetta skal ætlanin – sjálvandi treytað av, at eingin mótmælir henni – leggjast fyri landsstýrið til endaliga góðkenning.

Fleiri ung hava áhuga í at seta búgv í Nólsoy, og sambært Heðini Mortensen gongur ikki long tíð, áðrenn hesi kunnu fara undir arbeiðið, at seta føtur undir egið borð.

*Fyrstu grundstykkini í Nólsoy verða klár um fáar mánaðir, sigur Heðin Mortensen*

